16-09-2019

Eftirlit við fuglalívinum í Húsahaga

Hvussu ávirka vindmyllur og ljosseting á vindmyllur fuglalívið í Húsahaga



William Simonsen

Heiti: Hvussu ávirka vindmyllur og ljósseting á vindmyllur fuglalívið í Húsahaga

Høvundur: William Simonsen

Skrivað: Sept. 2019

Stovnur: William Simonsen

Takk til Silas Olofson og Jón Aldará fyri hjálp við fuglateljingini

Takk til Janu Mikkelsen fyri rættlestur

Svarthálsa.

Innihaldsyvirlit

Hvussu ávirka vindmyllur og ljósseting á vindmyllur fuglalívið í Húsahaga 3
Innleiðing 3
Vágameting hjá fuglum. 5
Kannaða økið 5
Úrtak 5
Niðurstøður og tilmæli 5
Kanningar 6
Eftirlit 6
Búfuglateljing 67
Úrslit 8
Eftirlit 8
Búfuglateljing 9
Yvirvaking við upptøkutólum 10
ÁRIN 12
Alment um lívfrøðiligt margfeldi 12
Fuglar og vindmyllur 13
Ljósseting 14
HEIMILDIR 15
Heimasíður 1617
TALVUR 1

Eftirlit við fuglalívinum í Húsahaga

HVUSSU ÁVIRKA VINDMYLLUR OG LJÓSSETING Á VINDMYLLUR FUGLALÍVIÐ Í HÚSAHAGA

INNLEIÐING

Í sambandi við ætlanirnar hjá SEV um ljósseting av vindmyllum í Húsahaga og ynski um at kanna árinið frá verandi vindmyllum á fuglalívið í Húsahaga, letur William Simonsen við hesum úr hondum frágreiðing um ávirkan frá vindmyllum og ljósseting á vindmyllur á fuglalívið í økinum. Endamálið er at kanna, um ljósseting av vindmyllunum er til skaða fyri fugl í økinum. Búfuglateljing er gjørd fyri at meta um møguligt árin frá vindmyllunum. Búfuglateljingin verður framd, fyri at kunna meta, um vindmyllurnar hava ávirkað tal og slag av búfugli á staðnum síðan uppseting.

Í sambandi við ætlan um at seta ljós á vindmyllurnar ávísar tímar um samdøgrið, krevur Yvirfriðingarnevndin, at árinskanning verður framd av ávirkanini av ljóssetingini. Hettar tí, at ljós kann draga fugl at sær, og tað kann viðføra samanstoyt við vindmyllurnar. Tíðarbilið mars 2017 til mars 2018 var sett til at vera eitt royndarár, har ljóssetingin á vindmyllurnar koyrir eftir eini skipan, ið ætlanin eisini er at brúka í framtíðini – um árinskanningin ikki verður orsøk til broytingar í hesi ætlan.

Aftan á at hava framt eftirlit frá 12. mars til miðjan apríl (2017) gjørdist greitt, at ljóssetingin ikki virkaði sum hon skuldi. Eg helt tó áfram at hava eftirlit við jøvnum millumbilum (tað gevur jú vitan) og framdi búfuglateljingina í juni - juli 2017. Ljóssetingin kom í lag til Ólavsøku, og eftirlitið byrjaði aftur á Ólavsøku. Fyri at fáa framt eftirlit um várið, meðan ljóssetingin virkaði, var eftirlit framt í apríl 2018.

Eitt ætlað eftirlit um kvøldarnar um heystið og várið vísti ikki at geva nakað (sí seinni í frágreiðingini). Eisini var avgjørt at nýta upptøkur av vindmyllum – bæði við ljós á og ikki. Hesi eftirlitstól virka, um okkurt t.d. ein fuglur rørir seg frammanfyri tey. Soleiðis kundi ein fylgja um fuglar fleyg móti myllunum. Fyrstu av hesum upptøkum blivu gjørdar um heystið 2017. Í samráð við SEV varð avgjørt eisini at nýta veturin 2018 og 2019 til eftirlit við vakmyndatólum. Hesi tól skuldu síggja, um fuglur fleyg móti/at vindmyllunum.

Frágreiðingin er grundað á:

1. búfuglateljingar fyri at meta um hvussu vindmyllulundin ávirkar fuglalívið
2. regluligar teljingar gjøgnum árið fyri at kanna eftir hvørjir fuglar nýta økið alt árið og fyri at vita um deyðir/skaddir fuglar liggja í økinum. Deyðir/skaddir fuglar kunnu vera deyðir/skaddir orsakað av samanstoyti við vindmyllurnar. Og um t.d. fleiri eru deyðir við vindmyllur, har ljós verður sett á, so kann konkluderast, at ljóssetingarnar draga fugl at vindmyllunum, so samanstoytur verður.

3. vøkutól, ið verða virkað til at taka upp film, um eitt hvørt rørir seg frammanfyri teim. Hesi vøkutól standa bæði við vindmyllur við og uttan ljósseting.

Í frágreiðingini verður so neyvt sum gjørligt greitt frá, hvørjir fuglar eiga í økinum og hvørjir síggjast í økinum gjøgnum árið.

Í frágreiðingini eru greiningar av møguligum avleiðingum, ið kunnu standast av verkætlanini. Hesar greiningar/metingar verða grundaðar á úrslit frá gransking innan evnið runt heimin eins og á egnar kanningar.

VÁGAMETING HJÁ FUGLUM.

Í hesi frágreiðing verður støðan hjá fuglinum mett eftir føroyska reyðlistanum og Bonnsáttmálanum. Støðan verður mett út frá stødd av stovni, og um bústøðini eru hótt (t.d. í minking).

KANNAÐA ØKIÐ

Økið, ið er kannað, er partur av Húsahaga og hoyrir til Tórshavnar kommunu. Økið liggur á uml. 320 m hædd og er uml. 36.000 m^2 til víddar. Sí kort 1.

ÚRTAK

Økið, ið verkætlanin snýr seg um, er í Húsahaga millum Húsareyn og Oyggjarvegin. Árinsmeting var gjørd av økinum, áðrenn vindmyllurnar vórðu settar upp. Tá vórðu skordýr og blómuplantur kannað í økinum í tíðarskeiðinum juni til september í 2012 og 2013; fuglateljing fór fram í juli 2012 og juni 2013. Tey vanligastu lendissløgini í økinum vóru eyrgrýti og heiða- og mosalendi. Úrslit frá hesi kanning eru at finna í frágreiðing frá 2013.

Saman við eftirlitinum hevur ein teljing av búfuglinum verið gjørd. Í økinum átti lutfalsliga stórt tal av fugli. Sløgini vóru svarthálsa, tjaldur, lógv, mýrisnípa, summartítlingur, grátítlingur og steinstólpa. Lógv og svarthálsa eru á føroyska fyribils-reyðlistanum (Fosaa et al, 2005). Av hesum sløgum er svarthálsa *Charadrius hiaticula* sera sjáldsom í Føroyum. Mest av fugli var í økinum í tíðini apríl – september. Hesa tíðina komu og fóru búfuglarnir. Í oktober blivu tað munandi fleiri ravnar og krákur í økinum. Láir, mýrisnípur og títlingar sóust framvegis, og eisini sóust óðinshanar; hesa tíðina var talan - fyri ein part - um ferðandi fugl, men mýrisnípan sæst alt árið og er búfuglur. Í tíðini november - mars vóru tað mest ravnar og krákur at síggja, men mýrisnípur og í minni mun grátítlingar sóust javnan; men desember til februar bara ravnar og krákur. Í apríl byrjaði ein, at síggja ymisku búfuglarnir. Longu tíðliga í apríl sóust tjøldur og títlingar, tjøldrini blivu tó ikki vanlig í haganum fyrr enn í mai. Seinni í apríl komu svarthálsurnar, aftaná komu steinstólpur og láir. Bládúgvur og starar sóust yvirhøvur um heystið.

Eftirlitið fann ikki nakran fugl, ið var deyður ella skaddur av vindmyllunum, hvørki av teim við ljósseting ella ikki.

Niðurstøður og tilmæli

Teljingin av búfugli í Húsahaga 2017 týðir ikki uppá, at búfuglameingið er minkað, í mun til teljingina áðrenn vindmyllurnar vórðu settar upp. Økið húsar einum lutfalsliga ríkum fuglalívi. Metast kann tískil ikki, at uppsetingin av vindmyllum hevur havt ringa ávirkan á talið av búfugli, ið húsast í økinum. Eftirlitið staðfestur ikki, at fuglur verður skaddur ella doyr av samanstoyti við vindmyllurnar; hvørki vindmyllur við ella uttan ljósseting. Mælt verður tó til eftirlit ávísar tíðir helst vár og heyst.

KANNINGAR

Eftirlit

Í samráð við SEV og Eyðun Eliasen, ið "sniðgevur" ljóssetingina, var ein eftirlitsætlan gjørd. Eftirlitsætlanin var eisini góðkend av Náttúrugripasavninum. Eftirlitsætlanin er viðfest sum viðfesti nr. 1. Eftirlitsætlanin er tilrættisløgd eftir, hvussu ljóssetingin er gjøgnum árið. Ljóssetingarætlan er viðfest sum viðfesti nr. 2. Fyri betur at kunna staðfesta ávirkan frá ljósseting, hevur undirritaði fingið SEV og Eyðun Eliasen at sløkkja og tendra ljóssetingina eftir ynski frá undirritaða ávísar tíðir um várið (apríl/mai) og heysti (oktober/november) – kallað intenst og samanberandi eftirlit.

Fyri at kunna staðfesta ávirkanina av ljóssetingini varð gingið framvið og millum vindmyllurnar útvaldar dagar sambært eftirlitsætlanini; hettar var fyri at finna deyðan fugl, ið møguliga var deyður orsakað av samanstoyti við ljóssettu vindmyllurnar. Gangast skuldi bæði framvið vindmyllum við og uttan ljósseting, so samanberast kundi, sí vindmyllurnar á kort 1. Gingið varð um morgunin, eftir at ljós hevur verið nýtt. Byrjað varð 12. mars um várið, tá flytifuglur kemur framvið, og búfuglurin kemur til landið. Fyri at eftirlitið skuldi vera nøktandi, var neyðugt, at talt var í einum geira frá vegnum og 50 metur út. Kanningar frá øðrum londum vísa, at 90 % av rovunum frá deyðsføllum orsakað av vindmyllum finnast innanfyri 50 metur frá vindmyllunum.

Tá eftirlit var framt, var tann livandi fuglurin eisini taldur. Teljingin av livandi fugli bleiv gjørd, fyri at fáa eina meting av, hvørjir og hvussu nógvir fuglar leggja leiðina framvið vindmyllulundini í Húsahaga. Hettar kundi síðani setast í samband við tal av fuglum, ið møguliga doyggja av vindmyllunum.

Intenst og samanberandi eftirlit: her var ynskið at gera eitt serligt eftirlit á vári og á heysti 2017. Um várið var eftirlitið, tá búfuglurin var í økinum og ymiskir flytifuglar koma fram við Føroyum; hettar er, meðan tað enn er nakað myrkt seint um kvøldið fra hálvum apríl til hálvan mai. Um heystið var hettar eftirlit í oktober, tá kunnu ferðandi fuglar koma framvið, og tá fara stórur partar av drunnhvítapisunum úr reiðrinum. Drunnhvítar kunnu dragast at ljósi, og stórt drunnhvítaból er ikki so langt burtur (Nólsoy). Í hesum tíðarskeiðnum vórðu ljósini tendrað í 2 dagar og sløkt í 2 dagar. Eftirlit var, bæði tá ljós hevði verið á vindmyllunum og ikki. Talt varð eftir seinna dagin, ljósini høvdu verið tendrað, og eftir seinna dagin tey vórðu sløkt. Soleiðis skuldu 16 dagar við ljósi og 16 dagar uttan ljós samanberast, og vera við til at vísa á møguliga ávirkan frá vindmyllunum.

Ætlanin var eisini at eygleiða fuglalívið við vindmyllurnar um kvøldið, meðan hettar serliga eftirlitið var framt. Við at eygleiða á henda hátt um kvøldið, kann møguliga síggjast ávirkan frá ljósinum á atferð hjá fuglinum. Eftirlit um kvøldið skuldi vera millum kl. 20-24. Tað vísti seg vera torført at eygleiða um kvøldið, bæði orsakað av at tað faktiskt er myrkt og illa ber til at halda eyga við fleiri myllum í senn. Fyri at bøta uppá nevnda trupulleika hava upptøkutól verið nýtt. Hesi upptøkutól virka tá okkurt rørir seg frammanfyri tey. So um fuglur fleyg móti ella framvið myllunum, bleiv tað tikið upp. Upptøkutól av hesum slagi, hava staðið bæði við myrka og upplýstar vindmyllur.

Mannagongdirnar eru grundaðar á mannagongdir nýttar og tilráddar av granskarum og stovnum í øðrum londum (t.d. Parkins et al 2015; Gelb & Delacretaz, 2009; Klem et al, 2009; Scottish Natural Heritage -Guidance on Methods for Monitoring Bird Populations at Onshore Wind Farms 2015).

Búfuglateljing

Fuglateljingin fór fram í juni og juli 2017. Hon varð framd við, at gingið varð eftir eini settari leið gjøgnum økið. Skrásett var, um fuglarnir eru sæddir á flogi, sitandi á lendi og/ella hoyrdir. Fuglar eygleiddir sitandi, ella hvørs atburður bendi á, at teir hoyra heima í økinum, eru skrásettir at eiga har. Fuglarnir vórðu skrásettir alt eftir, hvar teir sóust ella hoyrdust. Fuglateljingin umfataði økið innan svørtu strikuna á kort 1.

Kort 1. Økið í Húsahaga við vindmyllum. Búfuglur varð taldur innan svørtu strikuna.

ÚRSLIT

Eftirlit

Í 2017 byrjaði eftirlitið 12. Mars, og var eftirlit framt hvønn mánað árið út. Í 2018 var eftirlit frá 1. januar til 2. mai. Talt var ikki líka nógv hvønn mánað – meir var talt í bútíðini, og tá serligt eftirlit var sí viðfest 1 og talvur 2 og 3 (aftast). Stabbamynd 1 og 2 vísa okkum hvørjir fuglar síggjast í økinum gjøgnum árið. Av tí, at ikki varð talt líka ofta hvønn mánað, eru stabbarnir prosent av samlaðum skrásetingum fyri hvønn mánað. Stabbarnir geva eina mynd av virkseminum í økinum hjá teimum ymisku fuglunum gjøgnum árið, og eisini hvørjir fuglar eru í økinum teir ymisku mánaðirnir.



Stabbamynd 1. Fuglar í økinum mars-desember 2017. Stabbarnir eru prosentvísar skrásetingar av totalum fyri hvønn mánað. Stabbamyndirnar siga okkum, hvørjir fuglar eru í økinum hvønn mánað; stabbarnir siga eisini, hvussu sjónligir fuglarnir eru í mun til hvønn annan ymiskar tíðir.



Stabbamynd 2. Fuglar í økinum 1. januar – 2. mai 2018. Stabbarnir eru prosentvísar skrásetingar av totalum fyri hvønn mánað. Stabbamyndirnar siga okkum, hvørjir fuglar eru í økinum hvønn mánað; stabbarnir siga eisini, hvussu sjónligir fuglarnir eru í mun til hvønn annan ymiskar tíðir.

Um veturin eru fáir fuglar í Húsahaga. Sum stabbamyndirnar vísa, er tað í tíðini desember - februar bert ravnur (*Corvus corax*) og í minni mun kráka (*Corvus corone*) í økinum - viðhvørt var ongin fuglur at síggja hesa tíðina. Tíðliga um veturin og tíðliga um várið (november og mars) eru bládúgvur (*Columba livia*), grátítlingar (*Anthus petrosus*) og mýrisnípur (*Gallinago gallinago*) eisini at síggja í økinum. Fleiri fuglar verða í økinum í apríl, tá búfuglurin byrjar at koma. Búfuglur sæst í økinum til september/oktober; her koma eisini flytifuglar framvið t.d. óðinshanar (*Turdus iliacus*). Fuglurin í búðtíðini verður viðgjørdur næst. Yvirlit yvir fuglateljingarnar sæst í viðfestu 3, talva 1 og 2.

Búfuglateljing

Í økinum reiðrast fýra pør av svarthálsu (*Charadrius hiaticula)*, 3 pør av tjøldrum *(Haematopus ostralegus*), 4-5 pør av láum (*Pluvialis apricaria*), 1 par av *Mýrisnípu (Gallinago gallinago),* 2-3 pør av summartítlingi (*Anthus pratensis)*, 2 pør av grátítlingi (*Anthus petrosus)* og 5-6 pør av steinstólpu *(Oenanthe oenanthe)* sí kort 2, ið vísir reiðrandi fugl í økinum.



KORT 2. Skráseting av fuglapørunum● svathálsupør , ● steinstólpupør , ● láarpør , ● tjaldurspør , ● Mýrisnípa, o summartítlingapør og ● grátítlingapør

Yvirvaking við upptøkutólum

Fyri betur at staðfesta hvussu ljóssetingin ávirkar fugl, varð avgjørt at nýta upptøkutól. Talan er um upptøkutól, ið verða virkað til at taka upp um okkurt t.d. ein fuglur rørir seg frammanfyri tólið. Við at venda hesum upptøkutólum móti vindmyllum, var ætlanin at síggja, um fuglur fleyg móti myllunum. Filmað varð við vindmyllur bæði við og uttan ljósseting - til samanberingar. Niðanfyri (talva 1) sæst eitt yvirlit yvir upptøkur. Hugsað var, at t.d. drunnhvítar og lírar kundu lata seg lokka av ljóssetingini um heystið (og út á veturin), eisini er ávís ferðing hjá fugli hesa tíðina. Tí var áherðsla løgd á eftirlit um heystið. Men upptøkur eru eisini gjørdar um várið, veturin og summarið.

Nummar á vindmyllu og upptøku-tíðarskeið	**Viðmerkingar**
HH 3. Upptøka frá 23. okt. til 28. okt. 2017	200 upptøkur
HH 3. Upptøka frá 3. nov. til 12. nov 2017	197 upptøkur
HH 3. Upptøka frá 14. nov. til 20. nov. 2017	33 upptøkur
HH 3. Upptøka frá 20. nov. til 4. des. 2017	185 upptøkur
HH 7. Upptøka frá 21. okt. til 28.okt. 2017	3 upptøkur
HH 7. Upptøka frá 3. nov. til 11. nov. 2017	680 upptøkur

HH 7. Upptøka frá 11. nov. til 4. des. 2017	315 upptøkur. Hara á upptøku 44 og ravnur sæst á upptøku 316
HH 2. Upptøka frá 17. apríl til 20.mai. 2018	1077 upptøkur. Nr. 845/879/926 tjaldurs-lát.
HH 2. Upptøka frá 9. sept. til 7. okt. 2018	300 upptøkur
HH 2. Upptøka frá 24. sept. til 7. okt. 2018	332 upptøkur
HH 2. Upptøka frá 14. okt. til 4. nov. 2018	12 upptøkur. Fuglur (Óðinshani) lagdur út – burtur
HH 2. Upptøka frá 13. nov. til 12. des. 2018.	104 upptøkur. Her er másafuglur lagdur framman fyri upptøkutólið. Ravnur sæst á nr. 60, og krákur á nr. 61 -73
HH 3. Upptøka frá 17. jan. til 12. feb. 2018	67 upptøkur
HH 4. Upptøka frá 13. nov. til 3. des. 2018	22 upptøkur. Hara á nr. 18. Eisini fólk á fleiri myndum
HH 6. Upptøka frá 25. sept. til 26. okt. 2018	344 upptøkur
HH 6. Upptøka frá 13. nov. til 14. nov. 2018	70 upptøkur
HH 7. Upptøka frá 19 apríl kl. 18:00 til 20. apríl kl. 06:00. 2018	1580 upptøkur. Helst onkur skeiv innstilling
HH 7. Upptøka frá 24. okt. til 28. okt. 2018	200 upptøkur
HH 8. Upptøka frá 10. nov. til 30. nov. 2018	14 upptøkur. Nr. 17 og 19 hara. Nr. 18 rotta
HH 8. Upptøka frá 2. des. til 18. des. 18 des. 2018	30 upptøkur á 10 sek. Nr. 8 – 13, 15 og 34 kráka. Nr. 32 hara
HH 2. Upptøka frá 29. juli. til 4. aug. 2019	466 upptøkur. Her vóru eftirgjørdir småfuglar lagdir út fyri at vita. hvussu væl fuglur finst, ið liggur á lendinum. Sum sæst á upptøkunum verða fuglarnir tiknir av krákum
HH 4. Upptøka frá 1. jan. til 27. jan. 2019	74 upptøkur. Nr. 68 rotta. Nr. 13 og 14 ravnur. Nr. 16 - 29 og 35 – 38 krákur
HH 6. Upptøka frá 1. jan. til 9. jan. 2019 tikið inn 27 jan 2019	55 upptøkur. Nr. 14 og 15 krákur

Talva 1. Yvirlit yvir upptøkur (camera trap). Vindmyllur nummar 2, 3 og 4 (HH 2, HH3 og HH 4) høvdu ljósseting. Restin av vindmyllunum høvdu ikki. Flestu upptøkurnar vara 10 sek. nakrar 5 ella 15 sek.

Okt. Nov. 2017 hava upptøkutólini staðið til í 72 døgn tilsamans við HH 3 og HH7.

Jan. Feb. 2018 hava upptøkutól staðið til í tilsamans 26 døgn við HH 3.

Apr. Mai. 2018 hava upptókutól staðið til tilsamans 33 døgn við HH 2.

Sept. Nov. 2018 hava upptøkutólini staðið til í tilsamans 172 døgn við HH 2, HH 4, HH 6, HH 7 og HH 8.

Januar 2019 hava upptøkutól staðið til í tilsamans 35 døgn við HH 4 og HH 6.

Juli. Aug. 2019 hava upptøkutól staðið til í tilsamans 6 døgn við HH 2.

Fyri at tryggja at upptøkutólini virkaðu, varð kjøt lagt frammanfyri tólini fyri at lokka fugl til. Hettar virkaði, tí tá djór komu at eta, tendraðu upptøkutólini. Tað var bert tá kjøt varð lagt út, at fuglur (krákur og ravnar) sóust á upptøkunum. Hara kom eisini upp á onkuntíð, uttan at kjøt var lagt út. Rotta sást á summum upptøkum. Sum sæst á talvu 1 eru nógvar upptøkur. Hetta kemst av, at vindur og regn aktiveraðu upptøkutólið. Upptøkutólini skuldu vísa, um fuglar høvdu lyndi til at flúgva móti

vindmyllunum, og um fuglur hevði meira lyndi at flúgva móti myllum við ljósseting. Úrslitini vístu ikki, at fuglar høvdu lyndi til at flúgva móti vindmyllum við ljósseting í Húsahaga. Sama er galdandi fyri myllurnar uttan ljósseting.

Fyri at kanna eftir um fuglur, ið doyr í økinum, verður tikin/etin, blivu deyðir fuglar lagdir við vindmyllur, og upptøkutól sett at yvirvaka. Úrslitið herfrá var, at deyðu fuglarnir blivu tiknir. Tað at fuglur, ið doyr vegna samanstoyt við myllurnar, verður tikin/etin, ger tað truplari at staðfesta, um vindmyllurnar drepa fugl. Men her hava upptøkurnar verið ein hjálp, tí upptøkutólini hava samanlagt yvirvaka/filma vindmyllurnar í langa tíð (sí talvu 1), og møguleiki hevur verið at kunna sæð, um fuglur flýgur móti myllunum. Fyri at kanna hvussu væl teljararnir funnu fugl, vórðu eftirgjørdir smáfuglar lagdir út til teljara at finna aftur. Upptøkutólini vísa, at hesir líka sum alt annað, varð tikið. Vanligt er at síggja nakað av fjaðrarokilsi og restum aftaná, at ein fuglur hevur etið ein annan, tílíkt sá undirritaði ongantíð.

ÁRIN

Alment um lívfrøðiligt margfeldi

Í sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi verður tað lívfrøðiliga margfeldið skilmarkað soleiðis:

FJØLBROYTNI VIÐVÍKJANDI LIVANDI VERUM Í ØLLUM UMHVØRVUM: Á LANDI, Í VØTNUM, Í ÁUM OG Í SJÓNUM OG TAÐ VISTFRØÐILIGA SAMSPÆLIÐ, IÐ TÆR ERU PARTUR AV; HETTA UMFATAR PLANTUR OG DJÓR Í VISTSKIPANUM.

Hvørji sløg finnast í teimum ymisku vistskipanum er m.a. knýtt at veðurlagi, jarðfrøði, innrásarsøgu og at natúrligum og mannaskaptum broytingum. Øki við slíkum treytum líkjast ofta eisini, tá ið tað snýr seg um plantu- og djórasløg, og hetta hevur við sær, at til ber at býta økini sundur í lívøki (biotopar). Soleiðis ber til at geva eina einfalda yvirskipaða lýsing av føroysku náttúruni við støði í lívfrøðiliga margfeldinum. Og sostatt ber eisini til at gera eina skráseting av virðismiklum lívøkjum.

At eitt øki er meiri virðismikið enn annað, tá ið støðið verður tikið í lívfrøðiliga margfeldinum í økinum merkir, at har finnast serliga nógv sløg, ella at tað í økinum eru sjáldsom plantu- og djórasløg, ið eru viðkvom ella hótt sløg.

Varðveitsla av tí lívfrøðiliga margfeldinum merkir, at tey einstøku sløgini skulu verjast, og at fjølbroytni á lívøkjum eisini skal verjast, sjálvt um økini ikki eru serliga slagrík ella hava sløg við høgum varðveitsluvirði.

VARÐVEITSLA AV TÍ LÍVFRØÐILIGA MARGFELDINUM MERKIR, AT TEY EINSTØKU SLØGINI SKULU VERJAST, OG AT FJØLBROYTNIÐ Á LÍVØKJUM EISINI SKAL VERJAST; EISINI ØKI, IÐ IKKI ERU SLAGRÍK SUM T.D. VÁTØKI, TÍ HESI HÝSA JÚ SLØGUM, IÐ IKKI KLÁRA SEG AÐRASTAÐNI. ØKI, SUM ERU SLAGRÍK, MEN TÓ IKKI HAVA VARÐVEITSLUVERD SLØG, ERU VERD AT VERJA AV TEIRRI ORSØK, AT TEY ERU SLAGRÍK.

Fyribils reyðlistin fyri Føroyar (Fosaa et al, 2005) gevur eitt yvirlit yvir tey mest hóttu og sjáldsomu sløgini av plantum og fuglum í Føroyum, og hann kann verða nýttur til at meta um virðið á einum øki.

Fuglar og vindmyllur

Búfuglateljing

Í økinum reiðraðust 7 fuglasløg. Havandi støddina av økinum í huga, er fuglalívið í Húsahaga ríkt. Talan er fyri tað mesta um vanligan føroyskan hagafugl t.d. tjaldur, lógv, títling og steinstólpu. Økið er sermerkt við eisini at húsa svarthálsum, ið er sjáldsamur fuglur í Føroyum. Lendið er broytiligt; ráðandi lendini eru heiðalendi, grámosalendi og eyrgrýtislendi. Eisini eru fleiri tjarnir (smærri og størri) og eitt reyn. Broytiliga lendið er ein av faktorunum, ið eru avgerandi fyri lutfalsliga ríka fuglalívið.

Sambært sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (sí omanfyri), hevur økið virði, tí sjáldsamir fuglar reiðrast har. Svarthálsa, lógv, mýrisnípa og steinstólpa eru fevnd av Bonn-sáttmálanum (www.cms.int). Í fyribils føroyska reyðlistanum verður svarthálsa mett sum "sera hótt", og lógv mett sum "viðkvom" (Fosaa et al, 2005).

Tá ið vindmyllulundir verða lagdar í náttúruna, eru ávísir høvuðstrupulleikar, ið kunnu vísa seg. Hesir eru: ljóðdálking, órógv undir bygging, beinleiðis skaði vegna samanbrest, missur av lendi at halda til í og økt ferðsla, orsakað av vegagerð.

Í Húsahaga reiðraðust fuglar, ið sambært kanningum frá øðrum londum kunnu verða viðkvæmir í sambandi við vindmyllur. Úrslit frá 12 vindmyllulundum á bretska hálendinum vísa á, at talið av t.d. lógv, títlingi, steinstólpu og mýrusnípu kann minka á lendi nærhendis vindmyllulundum (Pearce-Higgins *et al*., 2009 & Rydell *et al*, 2012). Pierce-Higgins *et. al*. 2012 staðfesta, at mýrisnípa hevur torført við at koma fyri seg aftur aftaná órógvið, ið stendst av uppsetingini av vindmyllum. Í Smøla í Noregi síggjast líknandi gongdir sum í Bretlandi. Í Smøla vístu úrslitini, at lógv og mýrisnípa vóru millum teir fuglarnar, ið vórðu skrásettir at doyggja vegna samanstoytir (Bevanger et al, 2009). Tjøldur verða tó mett sum lutfalsliga harðbalin og flýggja ikki eins lætt og onnur sløg vegna órógv. Tó eru tey funnin deyð vegna samanbrest (Stewart *et al*. 2005; Rydell *et al*, 2012). Viðvíkjandi svarthálsu staðfesta Everaert & Stienen (2007), at svarthálsa heldur seg 40 m burtur frá myllum. Kanning í Norfolk í Onglandi vísir, at talið á reiðrandi svarthálsu kann minka, orsakað av órógv, (Liley og Sutherland, 2007). Óvist er, hvussu stórur stovnurin av svarthálsu er í Føroyum, men í 1996 var mett, at tað vóru 15 til 20 pør (Bloch og Sørensen, 1996). Um henda meting framvegis er galdandi, samsvara taldu pørini í Húsahaga til stóran part av føroyska stovninum.

Tað er vorðið staðfest, at bæði steinstólpa og títlingur hava víst seg at vera viðkvom yvirfyri vindmyllum og tí halda frástøðu (Hötker, 2006; Pierce - Higgins *et al*. 2009). Lokalar royndir benda tó á, at steinstólpa tolir væl at vera tætt við vindmyllur. Teljingar í Neshaga 2011 og 2014 skrásettu, at steinstólpa var millum fuglarnar á staðnum, ið reiðraðust tættast við myllurnar (200 m radius). Úrslitini frá teljingum í Føroyum útihýsa tó ikki, at vindmyllur ávirka steinstólpurnar (Olofson, 2011; Simonsen, 2015).

Ymiskt kann vera, hvussu viðkvæmir fuglar eru yvirfyri vindmyllum. Fleiri kanningar vísa, at fuglur heldur frástøðu frá vindmyllum (t.d. Larsen og Guillamette, 2007 & Gue, 2013). Men munur er á, hvussu viðbreknir ymisku bólkarnir (e.g. hópar og ættir) av fugli eru yvirfyri vindmyllum. Hvussu nógv órógv talan er um, er eisini avgerandi (Rydell *et al.* 2012; Langston and Pullan, 2004). Niðurgongdir í fuglameingi, ið eru staðfestar, eru yvirhøvur innanfyri 500 m frá vindmyllum (Rydell *et al.* 2012; Pierce-Higgins, 2009).

Nú verða vindmyllulundir vanliga settar upp, har tað er lítil vandi fyri samanstoyti (Layton, 2018). Orsakað hesum finnast nógvar kanningar, ið benda á, at vindmyllur ikki eru til stóran ampa fyri fuglalívið. Stórt felli av fugli kann standast av illa tilrættislagdari staðseting av vindmyllulundum í náttúruni (Langston and Pullan, 2004). Sannlíkindini fyri samanstoytum eru tengd at, um økið við vindmyllum liggur á eini leið, har fuglur flýgur framvið, t.d. á veg eftir føði ella tá ið flytitíð er. Samanstoytirnir kunnu hava við sær, at fuglur doyr. Ein kanning, ið vísir á týdningin av staðseting, stavar frá Northumberland í Englandi. Her var víst á, at hvør vindmylla á einum strandarøki drap 16 til 21 fuglar hvørt ár. Talan var mest um másafuglar. Vindmyllulundin var staðsett tætt við nógvan fugl (Newton & Little, 2009).

Sambært teljingini í 2013 og 2014, ið var áðrenn vindmyllulundina og teljingina 2017, so tykjast vindmyllurnar ikki at hava órógvað mongd av búfugli í Húsahaga. Fleiri búfuglar vórðu taldir í 2017 enn í teljingini undan uppseting av vindmyllum.

Ljósseting

Ljós kann roknast sum dálking, tá ið ljósið frá býum og bygningum lýsa umhvørvið so nógv, at stjørnuhimmalin hvørvur, samdøgurs rýtmur órógvast, og ferðamynstrið hjá flytifugli órógvast. Við tíðini eru tað vorðnir fleiri og fleiri bygningar, mastrar o.a., ið hava nógv elektriskt ljós. Hettar merkir, at fleiri øki (mest í ídnaðarlondum) hava nógv ljós um náttina. Nógvir fuglar flúgva um náttina í flytitíðini og til at stýra, er náttarhimmalin týdningarmikil. Um rutan hjá flytifuglunum liggur nærhendis ella yvir ljósu økjunum, kunnu teir verða ørkymlaðir av ljósinum - tí teir stýra eftir ljósi, og nú kemur brádliga nógv ljós eina aðrastaðni frá. Nógv dømi eru um samanstoyt millum fugl og upplýstar bygningar, har fuglurin doyr; hent er, at fleiri hundrað eru deyðir uppá eina nátt aftan á samanstoyt við høgan, væl upplýstan bygning. Mannaskapta ljósið vísir seg at kunna draga fugl til sín, og kann eisini fáa teir at flúgva í kring í økinum – tað ger, at dýrabar orka verður nýtt til annað enn at flúgva móti reiðurplássinum (Evans-Ogden, 1996; Cabrera- Cruz et al, 2017; Doren et al, 2018: www.audubon.org: Dan Mennhill /theconversation.com). Spurvafuglar (*passeriformesn*) og vaðfuglar (*charidriformes*), ið flyta langa leið, eru mettir sum viðkvæmir, tí teir flúgva yvir nógv øki við ljósdálking (Cabrera-Cruz et al, 2017). Búfuglarnir í Húsahaga hoyra til spurvafuglarnar og vaðfuglarnar. Men teir skulu ikki flúgva víðari. Um heysti hoyrdist og sóust ferðandi láir (vaðfuglur) og óðinshanar (spurvafuglur), men eftirlitið fann ikki, at hesir fuglar vórðu órógvaðir ella skaddir av vindmyllunum (við ella uttan ljós). Upptøkurnar frá apríl-mai, tá nógvur fuglur er í økinum, finna ikki at ljósseting órógvar. Um veturin vóru bert ravnar og krákur í økinum. Ravnur og kráka komu bert til myllurnar um matur varð lagdur út, so ljós aleina lokkaði ikki ravnarnar og krákurnar.

Sjálvt um stórt felli er staðfest í útlondunum (e.g. USA) av ljóssettum bygningum, so staðfesti hettar eftirlitið ikki nakað fellið orsakað av ljósseting á vindmyllurnar. Ein týdningarmikil orsøk til fellið orsakað av ljóssettum bygningum er, at hesir ligga í ferðingarutu hjá nógvum fuglum. Eisini er tað so, at ljóssetingin í Húsahaga bert er nakrar tímar um kvøldið og morgunin og ikki alla náttina. Heldur ikki røkkur ljósið so langt (programera til at fána/fade) sum ljósið á bygningum og konstruktiónum í útlondunum, har nógv fellið hevur verið.

Í framtíðini er tað tó týdningarmikið at hava eftirlit til tíðir, hetta skal helst vera um várið og heystið – serliga um SEV ætlar at ljósseta fleiri vindmyllur

HEIMILDIR

- Bevanger, K., Berntsen, F., Clausen, S., Dahl, E. L., Flagstad, Ø., Follestad, A., Halley, D., Hanssen, F., Lund Hoel, P., Johnsen, L., Kvaløy, P., May, R., Nygård, T., Pedersen, H. C., Reitan, O., Steinheim, Y. & R. Vang. 2009. "Pre- and post-construction studies conflicts between birds and wind turbines in coastal Norway" (Bird-Wind). NINA Report 505.
- Bloch, D., Kjeld, J.K. og Olsen B. 1996. Listi yvir fuglar í Føroyum. Føroya Náttúrugripasavn, Føroya Fuglafrøðifelag, Føroya Skúlabókagrunnur.
- Cabrera-Cruz, S.A., Smolinsky. J. A. and J. J. Buler. 2018. Light pollution is greatesr within migration passage areas for nocturnally-migrating birds around the world. Nature.com/scientificreports
